Hanna D. Andreassen

Fra: Lív Krogh Arge
Sendt: Thursday, February 1, 2024 11:31
Til: Barna- og Útbúgvingar Málaráðið
Cc: Terji Beder
Emne: SV: Hoyringarskriv – Uppskot um løgtingslóg um føroyskan førleikakarm

Góðan dag

Undirvísingarstýrið fegnast um nýggju lógina og tekur undir við henni.

Vit hava hesar viðmerkingar:

Til § 6: Vit mæla til, at *námsskipan* gjøgnumgangandi í lógartekstinum og viðmerkingunum verður nevnd áðrenn *námsætlan*. Námsskipan lýsir alla útbúgvingina, meðan námsætlan lýsir einstaka fakið.

Námsskipanin fyri miðnámsútbúgvingar eru lýstar í Ll. 62/2012 og kunngerð 9/2013 v.m.. Vit vilja vísa á, at tað møguliga skulu gerast broytingar í hesari lóg og tilhoyrandi kunngerð. Tað sama ger seg galdandi í aðra reglugerð, tí aðrar útbúgvingar hava eisini námsskipan lýsta í lóg.

Vinaliga

Lív Krogh Arge, løgfrøðingur
+298 555042 | liv@uvs.fo

Undirvísingarstýrið

+298 200 900 | undirvising@uvs.fo | www.undirvising.fo

Fra: Terji Beder <TerjiB@bumr.fo>
Sendt: 16. januar 2024 15:06
Til: Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Umhvørvismálaráðið <umhvorvi@umhvorvi.fo>; Løgmálaráðið <lmr@lmr.fo>; uvs@uvs.fo; Vegleiðingarstovan <vegleiding@uvs.fo>; Studni <studni@studni.fo>; Prógvstovan <provstovan@provstovan.fo>; Yrkisdepilin <yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo>; Nám <nam@nam.fo>; setur@setur.fo; info@vh.fo; sjonam@sjonam.fo; heilsuskulin@skulin.fo; tsk@tsk.fo; post@glasir.fo; mis@skulin.fo; kambsdalur@kambsdalur.fo; miv@miv.fo; rtl@student.setur.fo; mfs@mfs.fo; Granskingarráðið <Gransking@gransking.fo>; industry@industry.fo; kf@kf.fo
Cc: Barna- og Útbúgvingar Málaráðið <bumr@bumr.fo>; Hanna D. Andreassen <hanna@bumr.fo>; Elsa Østergaard <elsao@bumr.fo>
Emne: Hoyringarskriv – Uppskot um løgtingslóg um føroyskan førleikakarm

Góðan dagin,
Í sambandi við at ein førleikakarmur verður lýstur fyri tað føroyska útbúgvingarverkið, verður hjálagda lógaruppskot sent øllum viðkomandi pørtum til hoyringar.

Frágreiðing
Endamálið við lógaruppskotinum er at geva heimild til at kunna skipa ein føroyskan førleikakarm, sum skal fevna um allar prógvskyldugar og førleikagevandi útbúgvingar í Føroyum.

Ætlanin um at seta í gildi ein tílíkan førleikakarm kemst av ynskinum um, at Føroyar gerast fevnd av Bolognaavtaluni, og at tær føroysku útbúgvingarnar annars betri skulu kunna samanberast við aðrar útbúgvingar uttanlands.

Endamálið við førleikakarminum er at skapa samanhang millum føroyskar útbúgvingar og útbúgvingar í Evropa, soleiðis at hesar betri kunnu samanberast, umframt at skapa ein betri samanhang millum tær útbúgvingar, sum vit hava í Føroyum.
Endamálið er eisini at tryggja, at næmingar á einari givnari útbúgving ikki skulu taka fak, sum teir longu hava fullført á einum øðrum stigi í útbúgvingarskipanini, og at skapa betri møguleikar fyri lívlangari læru.

Við innførslu av einum førleikakarmi, skulu allar próvskyldugar og førleikagevandi útbúgvingar í Føroyum vísa til tann føroyska førleikakarmin í námsskipanum, námsætlanum og prógvum.
Prógvini skulu eisini vísa til tann evropeiska førleikakarmin fyri lívlanga læru (European Qualifications Framework for Lifelong Learning), og tá tað kemur til hægri útbúgvingar, skal eisini vísast til tann evropeiska førleikakarmin fyri hægri útbúgvingar (Framework of Qualifications for the European Higher Education Area).

Við uppskotinum fær landsstýrismaðurin heimild at góðkenna ein førleikakarm, umframt at flokka tær føroysku útbúgvingarnar eftir førleikakarminum.

Landsstýrismaðurin fær eisini heimild at gera nærri reglur um flokking av útbúgvingum, um førleikakarmin, harundir um námsskipan og námsætlan, prógv, heitir og Diploma Supplement.

Lógaruppskotið verður rættlisið eftir at hoyringarfreistin er farin.

Møguligar viðmerkingar vera sendar til bumr@bumr.fo í seinasta lagi **hósdagin 1. februar 2024 kl. 12.00.**

Vinarliga / Kind regards

Terji Beder
Fulltrúi / Advisor

Office: +298 306500
Mobile: +298 555018
Mail: terjib@bumr.fo

BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Children and Education

J. H. Schrøtersgøta 7
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

www.bumr.fo